TING-HELLAN

# Um at boykotta løgtingsarbeið og skrumbla stórmál ígjøgnum

**Fyri allar føroyingar, uttan mun til politiskan lit, má tað haldast at vera ein sorgarleikur, sum fer fram í Løgtinginum í hesum døgum. Tað er altíð harmiligt, tá flokkar halda uttanumparlamentariskar metodur vera neyðugar innantings. Tað er uppaftur harmiligari, at ein nýggj skipan Føroya og Danmarkar ímillum verður skrumblað ígjøgnum Tingið**



TINGHELLUKRONIKK
*Finnbogi Ísakson*
*finnbogi@post.olivant.fo*

Tað var lítið hugaligt at lurta og hyggja at Løgtinginum fríggjadagin, tá tvey uppskot um framtíðar viðurskifti Føroya og Danmarkar ímillum vóru til viðgerðar. Eitt uppskot til føroyska lóg og eitt ríkislógartilmæli um at seta eina danska lóg um somu viðurskifti í gildi í Føroyum. Innihaldið í báðum lógunum er tað sama, men viðmerkingarnar samsvara als ikki.

Tveir andstøðuflokkar, Tjóðveldisflokkurin og Miðflokkurin, vildu ikki greiða atkvøðu, og tingarbeiðið lá tí stilt í ein hálvan tíma ella so. Talan var sostatt um beinleiðis boykott.

Ikki hevur tað komið ofta fyri, at tingmenn hava boykottað tingarbeiðið, men nøkur dømi eru tó, sum eg skal greiða frá í stuttum.

## Dahlerup-málið

Løgtingið, sum varð tikið av í 1816, varð endurreist sum ráðgevandi Ting í 1852. Amtmaðurin, sum tá var tann ráðaríki og óhøviski Carl Emil Dahlerup, var løgtingsformaður. Longu í 1860 kom sperðil í millum amtmannin og Tingið. Ætlanin við løgtingslógini var at menna eitt demokratiskt stýrislag, men Dahlerup brúkti sína stóru makt til at varðveita embætisveldið.

Fleiri tingmenn vildu hava, at øll skip skuldu gjalda akkerspening, eisini tey føroysku. Amtmaðurin var ímóti og skuldsetti uppskotsstillararnar fyri at vilja leggja byrðar á sínar landsmenn. Síðani segði hann sum vant: "*Jeg er den eneste jurist her i tinget og altså den eneste, der forstår sig på lovfortolkning, og det vil derfor vist ikke falde vanskelig for tingets øvrige medlemmer at vælge mellem Bærentsens og Lützens lovfortolkning og min.*"

Tað vóru tingmenninir Enokkur Bærentsen, keypmaður — pápi Christian Bærentsen, sum seinni gjørdist amtmaður — og A.C. Lützen, skúlalærari, sum saman við próstinum Andreas Djurhuus skutu upp, at eisini føroysk skip skuldu gjalda akkerspening.

Norðoyatingmaðurin Hans David Matras úr Fugloy skrivaði í sína dagbók, at "*ingen ærekære lagtingsmænd kan være fornøjet med, i en offentlig forsamling, at sigtes for en fjende af sine landsmænd eller for uvidenhed.*" 13 av teimum 20 tingmonnunum, teirra millum prósturin, rýmdu tí av Tingi, boðaðu amtmanninum og løgmálaráðnum frá hesi avgerð og sendu løgmálaráðnum kæru um amtmannin. Í kæruni søgdu teir um amtmannin, at "*hans embedsførsel i den grad har været egenrådig og hensynsløs, at man kunne udfylde hele bøger med en beskrivelse derover.*"

Amtmaðurin legði trýst á summar tingmenn, sum eisini høvdu annað alment starv, og teimum, sum hann ikki kundi leggja á trýst á á henda hátt, vísti hann "*en hån og foragt, som umulig lader sig beskrive.*" Teir siga haraftrat, at roknskapirnir vóru ikki í lagi, og at amtmaðurin hevði "*ført ministeriet bag lyset*". Og at enda gjørdu teir greitt, at teir møttu ikki aftur á Tingi, fyrr enn Dahlerup var farin frá sum formaður.

Hetta var ikki lukkuligt mótmæli, tí tað var jú púra greitt, at Tingið kundi als ikki virka, tá meira enn helmingurin av tingmanningini ikki møtti. Løgmálaráðið tók Løgtingsins støðu til eftirtektar — og Dahlerup kom ikki aftur til Føroya, men gjørdist í staðin heraðsfúti í Odense. Hans David Matras skrivaði:

*"Og der blev så tyst! så tavst! så stille! at ministeriet ikke forlangte mer, men skaffede amtmand Dahlerup af vejen."*

## Sterlingrokið

Tað gekk mangan hart fyri seg í Tinginum undir krígnum og árini eftir kríggið. Eitt, sum elvdi til rok, var virðið á bretska sterlingpundinum.

Eftir at sambandið Danmarkar og Føroya ímillum slitnaði, eftir at týskarar høvdu hersett Danmark og bretar Føroyar, vóru Føroyar innan fyri sterlingringin, men Danmark uttanfyri. 27. mars 1941 varð semja gjørd millum Føroyar og Bretland um tey fíggjarligu viðurskiftini millum bæði londini. Kursurin á einum sterlingpundi varð settur til 22,40 kr, og kursurin kundi ikki broytast uttan so, at londini vóru samd um tað.

Eftir kríggið varð 16. august 1945 gjørd valutasemja millum Danmark og Bretland um, at kursurin á einum sterlingpundi skuldi vera 19,34 kr, men semjan umfataði ikki Føroyar orsakað av semjuni frá 1940. Stjórnin læt Løgtingið vita, at tað hevði verið hentari, um føroyska krónan hevði sama virði sum tann danska. Løgtingið tók undir við hesum, og føroyska krónan fekk sama virði sum tann danska frá 8. september 1945.

Men tá hevði rættiligt rok verið í Tinginum um málið. Tingið var soleiðis mannað, at Fólkaflokkurin hevði 12 tingmenn (frá Bartalsmessuvalinum 1943), Sambandsflokkurin 8 og Javnaðarflokkurin 5 tingmenn. Hesir báðir seinnu flokkarnir høvdu sostatt ein tingmann í meiriluta. Fólkafloksmenn mótmæltu avgerðini um pundið og fóru til hús. Thorstein Petersen las eina yvirlýsing upp, har mótmælt varð, at danir kravdu sama krónuvirði, áðrenn eitt løgtingsval hevði givið eina ábending um, hvussu tey ríkisrættarligu viðurskiftini fóru at vera í framtíðini. Flokkurin endaði yvirlýsingina við kravi um nýval sum skjótast.

Fólkaflokkurin metti krónuvirðið hava sera stóran týdning, tí flokkurin gekk við tonkum um at



*Tingið fer at viðgera málið aftur í dag*

stovna ein landsbanka — ein landsbanka, sum teir nú eru í ferð við at taka av.

Stjórnin bjóðaði føroyingum at veksla sterlingágóðan til kursvirðið 22,40 kr, um hetta varð gjørt fyri 8. september. Thorstein Petersen, sum var stjóri í Sjóvinnubankanum, vekslaði ikki bankans ágóða um, tí hann helt tað vera ómøguligt at siga, um danski búskapurin var farin um koll undir krígnum, og um vandi tí var fyri, at danska krónan fór at verða niðurskrivað heilt nógv. Krígsvinningurin hjá føroyingum hevði so farið fyri skeytið.

Sjóvinnubankin hevði um hetta mundið 635.000 pund til góðar í bretskum bankum. Skuldi bankin veksla til tann nýggja kursin, misti hann 3,06 kr. fyri hvørt pundið. Málið endaði í landsrættinum, og Sjóvinnubankin vann sakarmálið móti statinum, sum noyddist at gjalda bankanum útivið 2 mió.kr.

Um Løgtingið er at siga, at Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin hildu við sínum 13 tingmonnum fram við fundinum. Eitt mál, sum var til viðgerðar, var um viðurskiftini Danmarkar og Føroya ímillum. Sambandsflokkurin vildi hava, at áðrenn tingingar vóru við stjórnina, skuldi fólkaatkvøða vera um spurningin "*Vilja tygum, at Føroyar verða loystar úr øllum sambandi við Danmark?*"

Javnaðarflokkurin vildi heldur hava nýval til Løgtingið. Uppskotið hjá Sambandsflokkinum fall, meðan allir 13, sum vóru á fundi, samtyktu uppskotið frá Javnaðarflokkinum um at skriva út nýval at vera 6. november 1945.

Tað, sum Fólkaflokkurin fekk burturúr at halda seg burtur, var, at hann var ikki við til at viðgera málið um fólkaatkvøðu ella nýval.

## Boykottið í 1965

Eitt nokkso álvarsligt boykott hendi í Løgtinginum í 1965, meðan Sjálvstýrislandsstýrið sat. Á valinum 8. november 1958 vann Javnaðarflokkurin stórsigur og fekk 8 tingmenn av 30 móti 5 av 27 í 1954. Saman við Sambandsflokkinum og Gamla Sjálvstýrinum, sum flokkurin kallaðist tá, fekk Javnaðarflokkurin meiriluta og skipaði samgongu við Petur Mohr Dam úr Javnaðarflokkinum sum løgmanni.

Í 1962 fekk Javnaðarflokkurin aftur 8 tingmenn, hesaferð av 29 tilsamans. Sambandsflokkurin fekk 6 og Gamla Sjálvstýri 2. Tilsamans gav tað ein meiriluta uppá 16 av 29 tingmonnum.

Men Gamla Sjálvstýri skifti hest. Heldur enn at halda fram í gomlu samgonguni fór Gamla Sjálvstýrið upp í eina Sjálvstýrissamgongu. Aftan fyri hesa samgongu vóru Tjóðveldisflokkurin við 6 tingmonnum, Fólkaflokkurin við 6, Gamla Sjálvstýrið við 2 og Framburðsflokkurin við einum tingmanni, tilsamans 15 móti 14 í andstøðu.

Tað kom Sambands-